LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 026/2024 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Bárði á Lakjuni, løgtingsmanni, um marknaeftirlit og «Heildarætlanin um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum»

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Í Heildarætlanini verða tørvir hjá TAKS lýstir: Tørvur er m.a. á profileringsskipan, skannarum av ymiskum slagi, rúmsáttari hølum á flogvøllinum og á havnarlagnum í Havn. Er nakað tí framt, ið TAKS ynskir?
2. Hvør er metti kostnaðurin av øllum tí, ið TAKS metir vera neyðugt fyri at fáa styrkt um marknaeftirlitið sum best?
3. Undanfarni løgmaður segði, at vit hava ikki ráð at bíða – hvat sigur núverandi løgmaður?

Svar:

Fyri at svara spurningi 1 og 2 havi eg vent mær til Fíggjarmálaráðið, sum varar av TAKS. Fíggjarmálaráðið upplýsir fylgjandi:

Til spurning 1
"TAKS hevur ikki fingið serstaka játtan til at røkka málini í Heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028. Tó hækkaði játtanin til økt tolleftirlit við 500 tús. kr. í 2024.

TAKS hevur í 2023 og 2024 arbeitt við at fáa til vega eina profileringsskipan, men hetta hevur víst seg at vera eitt trupult mál at arbeiða við. Enn fyriliggur ikki nakað ítøkiligt í hesum máli.

Í 2022 keypti TAKS nýggjan skannara til eftirlitshølið á Farstøðini, og í 2023 keypti TAKS nýggjan skannara til eftirlitshølið á Posta. Harafturat hevur TAKS leypandi roynt eftir førimuni at keypt aðra neyðuga eftirlitsútgerð.

Tórshavnar Havn og Smyril Line eru nýliga farin undir at byggja nýggj høli á eystaru bryggju í Havn. Nýggj eftirlitshøli til TAKS eru partur av hesari byggiverkætlanini.

Dagføringin av eftirlitshølunum hjá TAKS á flogvøllinum er ikki byrjað, men arbeitt verður við at fáa hetta við í langtíðarætlanirnar hjá Vága Floghavn fyri flogvallarøkið og terminalin. TAKS arbeiðir við málinum um møguligt keyp av bingjuskannara og hevur ikki tikið støðu til hetta málið."

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Til spurning 2
"At fáa til vega eina profileringsskipan varð mett at kosta um 3 mió. kr. í 2022. Torført er at gera nýggja og dagførda kostnaðarmeting. Tó er hugsandi, at kostnaðarmetingin eigur at verða hækkað nakað.

Nýggjur bingjuskannari er mettur at kosta væl omanfyri 2 mió. kr., sum var kostnaðarmetingin í 2022, tá ið Heildarætlanin varð skrivað. At dagføra ymiskar skannarar hjá TAKS og at keypa aðra neyðuga eftirlitsútgerð varð mett at kosta um 1,6 mió. kr. í 2022. Skannarar og onnur neyðug eftirlitsútgerð eru lutvíst dagførd síðani 2022."

Til spurning 3
Eg eri samdur við spyrjaranum í at talan er um eitt sera týdningarmikið mál, og tað er neyðugt, at vit øll somul taka tøk til at basa innflutningin og misnýtslu av rúsevnum, soleiðis at vit kunnu venda gongdini. Lat onga iva vera um, at ungdómurin er okkara framtíð, og tí kunnu vit ikki liva við at ung detta niðurímillum. Hetta var eisini tí at sitandi landsstýrið, á fyrsta sinni, raðfesti at seta á stovn eitt barna- og útbúgvingarmálaráð, sum hevur ábyrgd av økinum. Víst verður í hesum sambandi til svarið frá landsstýrismanninum í barna- og útbúgvingarmálum til skrivliga fyrispurning 52-006/2023 um sama evni.

Í Tinganesi, 20. september 2024

Aksel V. Johannesen
løgmaður